## Aðalfundur FSN's

Umrøðan av aðalfundinum hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag, sum var millum jól og nýggjárs, kemur í Sosialin í morgin - og ikki í dag, sum vit ætlaðu

## Røkke fulla bók

Kjell Inge Røkke nýtist ikki at hugsa um, hvat fyritøka hansara, Aker, skal gera í framtíðini. Sambært Aftenposten hevur fyritøkan bíleggingar fyri heilar 155 mia. norskar krónur, og tað er næstan tvær ferðir meiri enn umsetningurin hjá fyritøkuni í fjør. Persónliga hevur Røkke heldur ikki nógv at hugsa um. Virðið á Aker er í løtuni 29 mia. krónur, og tá hann eigur 68 prosent av fyritøkuni, eru hansara partabrøv 20 mia. krónur verd.

Landsfundur Føroya Fiskimannafelags:

# Tøkni eigur at verða sjálvsagdur p




*Flestu royndir vísa, at bert tað verður arbeitt miðvíst við betringum, verður eisini fyrr ella seinni komið á mál við tøkni til vinnuna, sum eisini kann merkja eitt størri avreiðingarvirði. Egningarmaskinan er eitt gott dømi um hetta – eins og menningin frá snørisveiði til teldustýrdar snellur, ið teir gomlu ikki so mikið sum kundu havt droymt um*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Síðan 1996 hevur Helgi Nolsøe, verkfrøðingur á Fiskirannsóknar-stovuni, arbeitt við tekniskum loysnum umborð á skipum, sum bæði kunnu gera arbeiðið lættari - og loysnum, sum kunnu gera, at meira kann fáast burtur úr tilfeinginum.**
**- Slíkt eigur eisini at verða ein partur av almenna fiski-vinnupolitikkinum, sum jú er meira avgerandi hjá okkum enn hjá nøkrum øðrum landi, heldur Óli Jacobsen, sum hevur greitt okkum frá áhugaverdu framløguni hjá Helga Nolsøe**

TØKNI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á landsfundum hjá Føroya Fiskimannafelag plagar felagið at hava við ein gestarøðara, sum útgreinar okkurt evni, ið hevur samband við virksemið hjá fiskimonnum.

Í 2005 var tað Petur Steingrund, fiskifrøðingur, sum tosaði um fiskastovnar, og í ár var tað Helgi Nolsøe, verkfrøðingur á Fiskirannsóknarstovuni.

Tíverri fingu vit á Sosialinum ikki verið við til framløguna hjá Helga hendan dagin, men vit hava biðið felagsformannin, Óla Jacobsen, greidd okkum frá einum parti av tí, sum Helgi legði fram á landsfundinum.

Síðan 1996 hevur Helgi Nolsøe arbeitt við tekniskum loysnum umborð, sum bæði kunnu gera arbeiðið lættari og loysnum, sum kunnu gera, at meira kann fáast burtur úr tilfeinginum.

Í 2003 gjørdi hann eina frágreiðing um "Úrtøkuøking og hjáfram-leiðslu av toski hjá verk-smiðjutrolarum", har ein hópur av møguleikum fyri at fáa meira burturúr fiskinum vóru viðgjørdir. Summir av slíkum møguleikum eru sjálvandi lættari at gjøgnumføra enn aðrir. Men umborð á Skálabergi verða hesir møguleikar troyttir í tann mun, sum hetta er møguligt.

### Møguleikar við livratøku

Á landsfundinum hjá Føroya Fiskimannafelag var tað serliga livurin og kryvji-maskinur, sum vóru til umrøðu.

Helgi Nolsøe vísti á, at út frá 2005-tølunum kundu 7.000 tona av livur, sum hevði eitt virði uppá 35 miljónir krónur, komið til sættis, men veruligu tølini vóru bert ein lítil partur av hesum.

Hetta er jú eitt evni, sum hevur verið frammi í fleiri ár, og nógv hevur verið tosað, og nógv uppskot hava verið um, hvussu livurin kann koma til høldar.

Tað verður ásannað, at skal nøkur munandi broyting henda á hesum øki, er neyðugt, at hetta verður gjørt við maskinum, so sleppast kann undan tí eyka arbeiði, sum altíð vil liggja í eitt nú at taka livur.

Her eru fleiri verkætlanir í gongd – og fleiri slíkar, har tað verður arbeitt við maskinu, sum kann skilja livrina frá restini av innvølinum. Onkur av hesum sær í hvussu er lovandi út. Hetta merkir, at livurin kann fáast til sættis uttan stórvegis eyka stríð hjá manningini. Henda loysn merkir eisini, at livurin kann fáast til sættis frá maskinkruvdum fiski, har annars hevur verið roknað við, at innvølirnir verða meira ella minni oyðilagdir.

### Kryvjimaskinurnar

Nú hava flestu ísfiskatrolarar fingið kryvjimaskinur, og tað er eingin ivi um, at hendan maskinan er komin umborð fyri at vera. Tær mest vanliga nýttu kryvjimaskinurnar eru sera einfaldar, og tær hava tann vansa, at tær blóðga ikki fiskin, áðrenn hann verður